23. januar 2025

# Skúlastýrisfundur 01

| | |
|---|---|
| Møtt á fundi: | Erla, Snorri, Poula, Regin, Kári, Heidi |
| Forfall: | Kári |
| Fundarlongd: | 16-18 |

Skrá

1. Viðgera hoyringssvar til broytingar í LL um fólkaskúla
2. Ymiskt
3. áseta næsta fund
4. Rundvísing á skúlanum fyri áhugaðum

## Ad.1 Hoyringssvar

Uppskotið til hoyringar er at finna her:
https://www.bumr.fo/fo/kunning/uppskot-til-ummaelis/uppskot-til-ll-um-broyting-i-ll-um-folkaskulan-til-hoyringar

Skúlastýrið hevur hesar viðmerkingar:

**Yvirskipað**

Yvirskipað tekur skúlastýrið undir við ætlaðu lógarbroytingunum.
Skúlastýrið fegnast um, at so nógv í uppskotinum líkist royndarskipanini á Fløtum, tí okkara uppliving higartil er, at hetta er ein sera væl eydnað royndarverkætlan.

**Skiftið millum skúlar í 6-7 flokki**

Skúlastýrið tekur undir við, at skúlar í Føroyum verða skipaðir í deildir, og at tað sum náttúrlig avleiðing av hesum verður, at skiftið er millum 6. og 7.fl.
Skúlastýrið mælir staðiliga til, at hetta verður sett í verk.

**7. sum partur av hádeild og broytingin við at geva talmet í 7.fl**

Skúlastýrið tekur undir við broytingini um, at 7.fl skal hava talmet. Hetta er longu praksis í Skúlanum á Fløtum har 7.fl fær talmet í øllum lærugreinum 3 ferðir árliga - eins og 8.fl og 9.fl.
Skúlastýrið tekur eisini undir við øllum tillagingunum, sum gera skilnað millum 6.fl og 7.fl, ið staðfesta at 7.fl er byrjanin í hádeild og 6.fl er endin á miðdeild.

**Styttur skúladagur**
Skúlin á Fløtum hevur verið royndarskúli fyri styttum skúladegi. Granskingarúrslitini frá hesi stóru royndarverkætlan eru ikki klár enn, men tað er okkara greiða fatan, at hetta er stórur bati í skúlagongdini. Bæði dagslongdin og nýggja samansetingin av lærugreinunum!
Skúlastýrið mælir staðiliga til, at hetta verður sett í verk.
Lærarar, leiðsla, næmingar og foreldur eru glað fyri tillagingina og ynskja at halda fram við hesi skipan.

**Alisfrøði sum kravd lærugrein**
Skúlastýrið tekur undir við, at alisfrøði verður kravd lærugrein.
Hon er náttúrligur partur av útboðnum av náttúruvísindaligum lærugreinum.
Tí er hetta góð broyting.

**Nýtt tíma og lærugreinabýti**
Tað hevur verið alneyðugt at tillaga tíma- og lærugreinabýtið í nógv ár.
Hendan broytingin leggur upp til at javnvág verður millum lærugreinarnar. Harafturat gevur tað skúlunum rúm fyri tillagingum innanfyri ein karm, heldur enn smálutastýring.
Sum triðja lið í nýggja tíma- og lærugreinabýtinum er ein stytting av skúladegnum innbygd í nýggja býtið.
Skúlastýrið tekur undir við øllum trimum liðunum í broytingini.
Skúlastýrið hevur tó ta viðmerking, at mesta talið av tímum í hádeild ikki eigur at fara upp um 30. Tí mæla vit til, at hetta verður minkað úr 31 niður í 30 í uppskotinum.

**Tvílæraraskipan í grunddeild**
Skúlastýið tekur undir við, at tvílæraraskipanin verður styrkt. Men skúlastýrið ynskir eisini, at lykilin, ið tvílæraratímar verða lutaðir eftir, verður broytt so at útgangsstøði í frymlinum úr erva er 22 og ikki 24 næmingar, sum nú er. Tvs at lykilin verður lækkaður við tveimum næmingum á øllum stigum.
Skúlastýrið ynskir, at tillagingin leggur upp til at tvílæraraskipanin virkar eftir sama leisti øll 3 árini í grunddeild. 1., 2. og 3.fl

**Týskt sum valgrein**
Skúlastýrið tekur undir við broytingini við at minka tímatalið í týskum úr 4t/v til 2t/v.
Skúlastýrið tekur eisini undir við, at týskt skal vera valgrein frá 7.fl.
Hetta passar eisini væl saman við tankanum um, at hádeildin er samskipað og fevnir um 7.fl-9.fl.
Tí tekur skúlastýrið eisini undir við hesi skipan og ynskir hesa lógarbroyting.

**Inklusjón**

Tað er okkara meting at inklusjón, sum hugtak, er partur av góða skúlanum, men í hesum samanhanginum kennist tað, sum tað er komið inn, uttan at tað er greitt, hvat tað merkir. Merkir tað at sertilboðini skulu avtakast? Tí tað er als ikki gott. Merkir tað at allur fólkaskúlin skal tillagast, so at hann rúmar øllum. Tað er ivasamt um tað ber til at gera One-size-fits-all. Hetta má greinast betur, so at tað er greiðari, hvat hetta merkir ítøkiliga fyri læraran, fakið, flokkin, næmingin og bygningin. Tað er eisini átaluvert, at tað ikki er viðmerkt, at hetta hevur fíggjarligar avleiðingar. Bæði í rakstri og íløgum. Tað má við og verða eyðmerkt.
Vit eru ikki ímóti at tað kemur við í lógina; men tað má vera greitt og ítøkiligt, hvat tað merkir at inklúsjón er í endamálsgreinini.

**Samanumtikið**
Mælir skúlastýrið í Skúlanum á Fløtum til at seta ætlaðu lógarbroytingarnar í verk. Serliga skilmarkingin av at 7.fl er hádeild og ætlaða broytingin í tíma- og lærugreinabýtinum.
Men skúlastýrið leggur dent á at tørvur er á meira nágreining viðvíkjandi inklusjón og hvat hetta ítøkiliga merkir.

Ad.2

A

**Broytingar í 8ð**
Leiðslan kunnar um, at tey hava tikið avgerð um at býta grundbólkarnar í 8ð í trý.
Skúlastýrið tekur undir við hesi broyting. Foreldraumboðini fegnast um at grundbólakarnir fara úr 25 næmingum niður í 18.

B

**Innskriving í rásir í 7.fl - undantak-**
Leiðslan kunnar um at SáF hevur fingið loyvið at skriva næmingar inn í 7.fl í rásir eitt ár afturat. Hetta merkir at stóra royndarverkætlanin ikki steðgar av hesi orsøk.
Samstundis harmast skúlastýrið um at innskriving í rásir frá 2026 ikki kann vera í 7.fl.
Skúlastýrið tekur hetta upp sum serskilt punkt til næsta fund.

C

**Forskúli og 1.fl 25/26. - kunning.**
65 forskúlanæmingar eru teknaðir til skúlaárið 25/26. Tað er opið fyri tekning til seinasta plássið eftir meginregluni um ”first come / first serve til skúlabyrjan í august.
Hetta merkir samstundis at í mesta lagi ein næmingur kann byrja í 1.fl um eitt ár.
Næmingar, ið ikki fáa pláss í 1.fl um eitt ár fáa boðið pláss í Sankta Frans skúla, ið fær 3 1.flokkar í 2026.

73 næmingar eru teknaðir í 1.fl. 62 av hesum eru úr forskúlanum. Harafturat eru 4 tilmeldaði 1.fl, ið hava systkin í skúlanum. Eftir leiðreglunum fáa hesi boðið seinastu 4 plássini. TK hevur tikið avgerð um at teir seinastu 7 næmingarnir, ið eru tilmeldaðir fáa boðið pláss í

Sankta Frans skúla, ið fer at hava tríggjar 1.flokkar 2025. Næmingar av øðrum skúlum, ið ikki fáa pláss har fáa eisini boðið pláss í Sankta Frans skúla

Foreldraumboðini gera vart við at tað er stór ónøgd við frítíðarskúlan, ið húsast á Fløtum. Tað er tað ikki um tilboðið í Havnardali. Leiðslan kennir væl hesi sjónarmið. Arbeitt verður við at finna betri loysnir til frítíðarskúlan, sum í løtuni húsast á Fløtum, men eingin loysn er fyrstu árini. Kommunustýrisumboðið kunnar um at TK fer at raðfesta at fáa hóskandi høli til frítíðarskúlar, sum í løtuni eru í skúlunum í TK, men hetta fer at taka tíð.

D

**Eftirmeta teldupolitikkin**

Forkvinnan hevur fingið áheitan um at eftirmeta teldupolitikkin hjá skúlanum. Hetta verður tikið sum evni fyri seg á næsta fundi.

E

**Telefonir**

Forkvinnan hevur fingið áheitan frá fleiri foreldrum um at ikki seta bann móti telefonum í skúlatíð, men at halda fast við verandi politikk, ið er at telefonin liggur í skápinum í skúlatíð. Hetta verður tikið sum evni fyri seg á næsta fundi við tí fyri eyga at staðfesta verandi telefonpolitikk.

Ad.3

Hósdagin 13. mars kl 16-18.